# Eingin skalar Ørvin

**Hesa ferð eydnaðist tað Kvívíkinginum at leggja Argjabátin afturum seg í kappingini um næstfremsta plássið**

8–MANNAFØR
*Jóannes Hansen*



*Manningin á Ørvi hevur verið rættiliga stinn í kappingini í ár og vann aftur á jóansøku*
*Mynd: Høgni Jacobsen*

Munurin aftur til kapp-ingarneytarnar var ikki so stórur á málinum, sum hann hevur verið í onkrari av hinum kappingunum. Men tað var eingin ivi um, hvør fór at vinna. Ørvur var eina bátslongd frammanfyri tann næsta á mál, og tað tóktist sum um, at um teir høvdu havt verið meiri hóttir, so høvdu teir umborð á Ørvi verið førir fyri at sett uppaftur meiri á.

Eingin skalaði Ørvin hesa ferð, og tað tykist ikki serliga sannlíkt, at nakar fer at skala honum í næstu kappingunum. Eftir tættan start, har Ørvur, Kvívíkingur og Argjabáturin á fyrsta teininum høvdu fylgst lið um lið, so sigldi Ørvur frá hinum. Á 1000 metra málinum var hann hálva bátslongd frammanfyri hinar. Tá ið hálvt málið var rógvið, hevði Kvívíkingurin hug til at leggja seg upp á síðuna av Ørvi, sum kortini svaraði aftur og økti til eina bátslongd.

Merkisvert var tað, at Argjabáturin hesa ferð ikki megnaði at halda Kvívíkingin aftanfyri seg. Ljósablái báturin fylgdi væl við, meðan reyði Argjabáturin ikki megnaði at varðveita sína støðu frá undanfarnu kappingunum. Sjálvt um teir tóktust toga nógv í árarnar, so munaði tað ikki, sum tað plagar og í staðin fyri at flyta frá øðrum og fram á fremsta plássið, so duttu teir á Argjabátinum aftur á triðja plássið. Sjálvandi var tað ikki soleiðis, at teir høvdu ætlað, at tað skuldi laga seg á Jóansøkuni.

# Vestmannadreingir fyri fyrstu ferð

**Eftir at hava verið framvið í hinum trimum kappingunum eydnaðist tað hesa ferð Havfrúnni at gera bart**

5–MANNAFØR DREINGIR
*Jóannes Hansen*

Frammanundan høvdu teir verið fyrst nummar trý og so tvær ferðir nummar tvey.

Kappróðrarárið hevur ikki heilt verið soleiðis hjá vestmenningum, sum tey plaga at vera. Men dreingirnir syrgdu leygardagin á Jóansøku fyri, at tað aftur í ár – í hvussu so er eina ferð – var neyðugt at skipa fyri móttøku av kappróðrarvinnara í Vestmanna.

– Vit hildu okkum liggja væl fyri, og tá ið vit komu á mál, hildu vit, at vit vóru fyrstir, men vit tordu ikki at trúgva tí, fyrenn vit sóu vestmenningarnar á havnarøkinum fegnast um sigurin, sigur Jóhannus Johannesen, sum er annar av lærmonnunum og bátsformaður umborð á Havfrúnni. Saman við honum var Tummas Olsen, sum er hin lærmaðurin, eisini við til at manna Havfrúnna í fjør. Allir hinir umborð royna seg fyri fyrstu ferð í kappróðri, so tað kann ikki sigast annað, enn at tað hevur roynst væl. Elsti maðurin er akkurát vorðin átjan ár, og tann yngsti er fimtan ár.

Sílið og Tjaldrið royndu at bjóða av, og Blikur var eisini væl við. Men sum í so nógvum øðrum kappingum fyrr í ár, so vísti tað seg hesa ferð, at tað ikki bar til at taka bátin, sum hevði fingið besta startin. Havfrúgvin megnaði at varðveita oddastøðuna, og hóast Sílið var fyrst at fara undir endaspurtin og munurin fram í oddin tóktist minka eitt vet, so svaraðu vestmannadreingir aftur og vunnu rudduliga.

Sílið er framvegis best fyri í FM kappingini. Munurin aftur til Havfrúnna er fimm stig, og vestmannadreingir hava ikki mist mótið um, at tað skal eydnast at vinna FM heitið, sum teir seinast vunnu í 1999, tá ið báturin var nýggjur. Teir, sum manna Havfrúnna, eru Remi Egilsnes – Tummas Olsen, Jóhannus Johannesen, Bogi Nielsen, John Martin Andreasen, Egil Heinesen og Heini Johansen.

Royndin Fríða var á startmálinum, men vágsdreingir vóru ikki við í jóansøkukappingini. Teir høvdu trupulleikar við róðrinum. Roynt varð við nýggjum róðri, men tað sat ikki, sum tað skuldi, og so var einki annað at gera enn at geva skarvin yvir, áðrenn startskotið small.

# Kendu seg kroystar at vinna

**Eftir sigurin á Jóansøku halda teir umborð á Jarnbardi vánir vera fyri at vinna FM, men teir ásanna, at kappingin verður stór**

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

Hóast hetta er fyrsta árið, at teir manna Jarnbard, so er talan um roynda manning, sum leygardagin gjørdist triði vinnarin í kappingini millum 6–mannafórini við monnum og harvið so at siga tók sigurin frá vágbingum umborð á Smyrli, sum vóru einasta vónin hjá suðuroyingum fyri sigri á Jóansøkuni.

Teir umborð á Jarnbardi hava verið framvið á hinum stevnunum, og sigurin og harvið tey sjey stigini á Jóansøku bera við sær, at teir bara eru trý stig aftanfyri Smyril.

– Vit vóru greiðir yvir, at um spenningurin um FM heitið skuldi varðveitast, so var neyðugt hjá okkum at fáa fult hesa ferð. Vit vóru sera uppsettir, og sjálvandi eru vit ovurfegnir um, at tað eydnaðist. Hetta hevur við sær, at tað verður rættuliga spennandi at rógva aftur leygardagin, sigur Leivur Johannesen, sum er annar av toftimonnunum og bátsformaður umborð á Jarnbardi.

Hvat høvdu tit gjørt undir venjing fyri at økja um møguleikan at vinna?

– Talan var bara um at justera smálutir. Tað ber ikki til at venja so nógv, nú tað er so stutt millum kappingarnar, men munurin hevur fleiri ferðir verið so lítil, at tað telur nógv at fáa smáar lutir justeraðar.

Eru tit á FM kós?

– Smyril liggur framvegis best fyri, og kappingin á Jóansøku vísti, at umframt okkum og Smyril kunnu Páll Fangi og Strálan gera seg galdandi í teimum trimum kappingunum, sum framvegis eru eftir. Men sigurin hjá okkum í Suðuroy ber við sær, at tað er upp til okkum sjálvar at gera av, um vit skulu vinna FM ella ikki.

Nær vóru tit greiðir yvir, at tit høvdu vunnið?

– Vit vóru væl við allan vegin, og á fyrsta teininum kappaðust vit við Páll Fanga, sum fekk besta startin av øllum. Men vit vistu eisini, at í undanfarnu kappingunum hava teir umborð á Smyrli havt ein framúr endaspurt. Vit hildu okkum vera fyrstar á mál, og tað vísti seg tíbetur, at sjálvt um Smyril hevði góðan endaspurt, so høvdu vit nóg mikið at geva av. Munurin var ein stórur skutur, so tað var rættuliga tætt, ásannar Leivur Johannesen.

Tá ið Jarnbardur kom aftur til Havnar varð skipað fyri móttøku í Knørra neystinum. Knørrafelagið, sum Jarnbardur er partur av, heldur til í neystinum undir Kolagarðinum hjá Valdemar Lützen við síðuna av skeiva pakkhúsinum. Har var suppa at fáa leygarkvøldið, og teir umborð á Jarnbardi halda, at tað eru vánir fyri suppu aftur nú leygarkvøldið, men so skulu smáu marginalirnir aftur vera í parti við teimum.

## Nógvar royndir

Fleiri, sum eru við til at manna Jarnbard, hava áður verið við til at vinna FM, men teir hava ikki verið við til at manna Jarnbard áður. Um tað fer at eydnast Jarnbardi at vinna FM, so verður tað fyrsta ferðin yvirhøvur, at Jarnbardur við monnum vinnur FM. Kvinnurnar hava fleiri ferðir víst, at tað er einki í vegin við bátinum.

Fleiri av manningini hava áður vunnið FM við Havnarbátinum, og onkrir hava vunnið FM við Gongurólvi og Sílinum. Talan er harvið um rættuliga roynda manning. Elsti maðurin er 30 ár, og tann yngsti er 24. Miðalaldurin man liggja um 25–26 ár. Teir, sum manna Jarnbard, og sum vunnu á Jóansøku leygardagin, eru hesir: Jóhan Joensen – Jóhan Hansen, Andreas Poulsen, Jákup Zachariassen, Thomas Christiansen, Heini Tausen og Leivur Johannesen.



# Argir og Havnin stavn um stavn



*Tað eydnaðist Sílinum at vinna á jóansøku, og tær liggja nú bert eitt stig aftanfyri Blik*
*Mynd: Høgni Jacobsen*

**At tað ikki eydnaðist Bliki at fáa meiri enn trý stig, meðan Sílið sum tepur vinnari fekk fult hevur við sær, at tað er púra opið í FM kappingini millum Havnina og Argir**

5–MANNAFØR GENTUR
*Jóannes Hansen*

Argir 22 og Havnin 21. Soleiðis er støðan í gentukappingini, nú tað resta tríggjar kappingar. Við sigrinum á Jóansøku lyfti Sílið sær upp á 21 stig. Blikur, sum hevur verið fremstur, er framvegis á odda, men tær megnaðu bara fjórða plássið í Jóansøkuróðrinum, og tað hevur við sær, at munurin frá Bliki og aftur til tær á Sílinum bara er eitt stig, og harvið er kappingin púra opin.

Stóran part av 1000 metra teininum vóru tað teir fýra bátarnir, sum endaðu á fýra teimum fremstu plássunum, sum lógu rættuliga tættir á odda. Havnar Róðrarfelag átti tveir av fremstu bátunum. Drekin kappaðist leingi við Havfrúnna, og hesir báðir bátarnir vóru so tættir, tá ið teir fóru um málið, at tað á upptøkunum ikki bar til at siga hvør var frammanfyri av teimum. Tí fingu báðir bátarnir fimm stig.

Sjey stig fekk Sílið, sum gekk sera væl á síðstu metrunum. Sílagenturnar vóru ein stóran hálvan skut frammanfyri hinar á málinum.

Við bæði gull og silvur krónum á Jóansøkuni staðfestu gentubátarnir hjá Havnar Róðrarfelag, at tað stendur væl til hjá teimum. Um tær skulu vinna FM er kortini ikki heilt víst. Tað verður Blikur av Argjum eisini við til at gera av. Hesa ferð høvdu argjagenturnar ikki marginalirnar á síðani síðu. Tær vóru eina bátslongd aftanfyri vinnarabátin, men tað bar bara fjórða plássið og harvið trý stig við sær.

# Gongurólvur vísti Jarnbardi frá sær

**Hóast Jarnbardur aftur hesa ferð tóktist ætla sær at basa favorittinum, og tað leingi tóktist skula eydnast, so vísti Gongurólvur at enda neyðuga treystleikan**

6–MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Lítil ella rættari sagt eingin ivi er um, at Gongurólvur fer at vinna FM. Tær hava vunnið allar fýra kappingarnar, og nú er tað bara ein spurningur, um tað fer at eydnast teimum at vinna FM heitið nú leygardagin, ella um tær skulu bíða inntil á Vestanstevnuni í Sandavági annan leygardag. Gongurólvur við kvinnum hevur ikki vunnið FM síðani í 1995.

Tvær tær síðstu ferðirnar hevur Jarnbardur rættuliga bjóðað Gongurólvi av. Soleiðis var eisini á Jóansøkuni. Jarnbardur fekk besta startin, og stóran part at 1000 metra teininum tóktist tað sum um, at tann eina vikan, sum tær umborð á Jarnbardi høvdu lagt afturat stuttu venjingartíðini, skuldi hava við sær, at tær fóru at vinna. Jarnbardur var fremstur, og tað var ikki fyrrenn í sjálvum endaspurtinum, at tær noyddust at geva skarvin yvir.

Gongurólvur hevði ongantíð slept Jarnbardi leysum. Í endaspurtinum megnaði Gongurólvur at leggja seg á odda, men tær umborð á Jarnbardi royndu at svara aftur. Tað eydnaðist ikki heilt, tí á málinum var Gongurólvur ein stóran skut ella eina lítla hálva bátslongd frammanfyri. Men avrikið hjá Jarnbardi kundi bent á, at tað eisini verður spennandi í Fuglafirði leygardagin.

Páll Fangi og Lómur vóru leingi við í kappingini. Lómur misti eitt sindur í endaspurtinum, meðan Páll Fangi var so mikið væl við, at munurin frá Gongurólvi og aftur til tær úr Klaksvík bara var ein bátslongd. Tað kundi bent á, at fleiri enn tveir bátar eisini fara at vera við í kappingini um fremstu plássini í næstu róðrunum.

**Fimmmannafør, dreingir**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 26 |
| 2 | Havfrúgvin | 21 |
| 3 | Blikur | 15 |
| 4 | Tjaldrið | 14 |
| 5 | Fípan Fagra | 5 |
| 6 | Royndin Fríða | 4 |
| 7 | Junkarin | 2 |
| 8 | Kollur | 1 |
| 9 | Bárnan | 0 |

**Seksmannafør, kvinnur**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 28 |
| 2 | Páll Fangi | 18 |
| 3 | Lómur | 14 |
| 4 | Jarnbardur | 10 |
| 5 | Smyril | 8 |
| 5 | Fortuna | 5 |
| 7 | Fuglfirðingur | 5 |

**Fimmmannafør, gentur**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Blikur | 22 |
| 2 | Sílið | 21 |
| 3 | Havfrúgvin | 13 |
| 4 | Drekin | 16 |
| 5 | Firvaldur | 5 |
| 6 | Ørnin | 5 |
| 7 | Fípan Fagra | 2 |
| 8 | Kollur | 0 |
| 8 | Junkarin | 0 |
| 8 | Tjaldrið | 0 |
| 8 | Hulda | 0 |

**Seksmannafør, menn**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Smyril | 24 |
| 2 | Jarnbardur | 21 |
| 3 | Strálan | 14 |
| 4 | Páll Fangi | 14 |
| 5 | Lómur | 7 |
| 6 | Sølmundur | 3 |
| 6 | Sundabáturin | 2 |
| 8 | Gongurólvur | 1 |
| 9 | Snopprikkur | 0 |
| 9 | Kollfirðingur | 0 |
| 9 | Fortuna | 0 |
| 9 | Riddarin | 0 |

**Áttamannafør**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 28 |
| 2 | Argjabáturin | 23 |
| 3 | Kvívíkingur | 16 |
| 4 | Knørrur | 13 |
| 5 | Teistin | 8 |
| 6 | Toftabáturin | 3 |
| 7 | Gullbrandur | 0 |

**Tíggjumannafør**

| nr. | | stig |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 24 |
| 2 | Nólsoyingur | 21 |
| 2 | Havnarbáturin | 18 |
| 4 | Vestmenningur | 12 |

## Kappróðrarúrslit á Jóansøku 2003

**49 bátsmanningar róðu FM-róður á Jóansøku á Tvøroyri. Úrslitini vóru hesi:**

**Fimmmannafør, dreingir**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Havfrúgvin | 5:01:19 |
| 2 | Sílið | 5:04:05 |
| 3 | Tjaldrið | 5:10:12 |
| 4 | Blikur | 5:15:18 |
| 5 | Junkarin | 5:19:10 |
| 6 | Kollur | 5:26:15 |
| 7 | Fípan Fagra | 5:29:05 |
| 8 | Báran | 5:29:06 |
| | Royndin Fríða | 0:00:00 |

**Seksmannafør, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Gongurólvur | 5:08:02 | 1G |
| 2 | Jarnbardur | 5:09:18 | 1G |
| 3 | Páll Fangi | 5:10:00 | 1G |
| 4 | Lómur | 5:10:10 | 1G |
| 5 | Smyril | 5:22:04 | 1G |
| 6 | Fuglfirðingur | 5:32:21 | 1G |
| 7 | Fortuna | 5:34:16 | |

**Fimmmannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 5:23:19 |
| 2 | Havfrúgvin | 5:23:51 |
| 2 | Drekin | 5:23:51 |
| 4 | Blikur | 5:25:32 |
| 5 | Ørnin | 5:33:43 |
| 6 | Firvaldur | 5:36:32 |
| 7 | Junkarin | 05.43.68 |
| 8 | Tjaldrið | |
| 9 | Fípan Fagra | 5:55:58 |
| 10 | Hulda | 5:56:16 |
| 11 | Kollur | |

**Seksmannafør, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 07.22.19 |
| 2 | Smyril | 07.23.05 |
| 3 | Páll Fangi | 07.25.16 |
| 4 | Strálan | 07.26.16 |
| 5 | Lómur | 07.26.19 |
| 6 | Sølmundur | 07.29.08 |
| 7 | Sundabáturin | 07.31.17 |
| 8 | Gongurólvur | 07.33.24 |
| 9 | Riddarin | 07.40.22 |
| 10 | Snopprikkur | 07.53.07 |
| 11 | Hvessingur | 07.54.01 |

**Áttamannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Ørvur | 7:02:10 |
| 2 | Kvívíkingur | 7:04:06 |
| 3 | Argjabáturin | 7:05:12 |
| 4 | Knørrur | 7:13:00 |
| 5 | Teistin | 7:35:03 |

**Tíggjumannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Nólsoyingurin | 9:10:19 |
| 2 | Eysturoyingur | 9:14:05 |
| 3 | Havnarbáturin | 9:18:13 |
| 4 | Vestmenningur | 9:26:18 |